


*Gongdin hjá B68 tey 24 árini í bestu deildini. Trý gull-, eitt silvur-, og seks bronsumerki er úrtøkan, nú felagið fyribils sigur farvæl við bestu deildina*

*Framhald av síðu 21*

um. Toftamenn endaðu næstaftastir. Eitt stig framman fyri ÍF, og tungan á vágskálini var uttan iva sigurin hjá B68 í Fuglafirði.

**Eysturoyargullið**

Næstu árini sýndu av álvara, at eysturoyggin nú var at rokna sum maktdepilin í føroyskum fótbólti.

GÍ vann gullið í 1983, og so komu toftamenn av álvara ígongd. Við John Kramer at stýra liðnum, eydnaðist tað tvær ferðir á rað at vinna meistaraheitið. Og ikki minst var tað ein imponerandi staðfesting, at liðið hesi bæði árini bert tapti tríggjar landskappingardystir. Og tá lagt verður afturat, at liðið - eftir at hava tapt fyrsta dystin í 1985 4-1 – spældi trettan dystir við málmuninum 18-3.

Leikararnir á B68-liðnum hesi árini fingu í nógvar mátar hetju-status á Toftum. Millum hesar kunnu nevnast nøvn sum Axel Højgaard, Jens Christian Hansen, Ingemar Olsen, Kjartan Nesá og Ingolf Petersen.

Og eftir hetta var B68 eitt lið, sum tú skuldi rokna við í føroyskum fótbólti. Tað var kanska ikki altíð, at endastøðan varð heilt so ovarlig, men stríðsviljin var eyðkendur. Teir góvust ikki fyrr enn seinasta bríksláð, og tó at teir av mongum fingu eyknevnið, B-Gúpp-og-trýss, so mundi hetta einamest vera eitt tekin um hálvgum øvundsjúku frá liðum, sum kanska megnaðu at spæla vakrari fótbólt enn toftamenn, men sum ikki megnaðu at fylgja við tí engagementi, sum toftamenn løgdu í sítt spæl, og sum oftani tryggjaðu teimum stig, sum teir kanska ikki so nógv spældu seg til.

**Hildu støðinum**

Og tó at tað skuldu ganga sjey ár, áðrenn gullið fyri triðju ferð kom á Svangaskarð, so vóru toftamennnir alla tíðina við. Tó at teir í 1987 máttu niður á sætta plássið, so vóru teir árið eftir við til tað allar seinasta, tá teir endaðu eitt stig aftan fyri HB í einum kappingarári, har B36 í summarsteðginum mundi halda seg hava vunnið alt.

Í 1989 gjørdist talan aftur um bronsu, meðan árini ’90 og ’91 ikki teljast millum teirra, sum tey í felagnum hava størstu minnini um. Tó at úrslitini her ikki vóru av teimum allarbestu, so var tó greitt, fleiri nýggir stórleikarar vóru um at finna vegin fram á Toftum.

Eingin teirra var bjartari enn Øssur Hansen, ið sum 21 ára gamal í 1992 var maðurin, sum heilt nógv roknaðu við. Eisini hevði liðið nú fingið styrk við Abraham Hansen, umframt at málslúkurin, Bergur Magnussen, eisini byrjaði venjingarnar her, tó at honum skjótt stóð greitt, at drúgvur knæskaði framhaldandi var til fortreð.

Við Jógvani Norðbúð sum venjara, hugdi B68 sjáldan aftur hetta kappingarárið. Einastu ferðina var kanska, tá teir á grasinum á Svangaskarði vórðu mest sum úrlætnir av GÍ. Men enn einaferð vann treiskni hjá toftamonnum fram, og eftir at hava vunnið í Vági á næst seinasta leikdegi, var mest sum greitt, at gullið kom til høldar, og tað gjørdi tað eisini.

**Óheppin samanfall**

Hetta var seinasta ferðin, at B68 var heilt uppi á tindunum. Gaman í megnaðu teir av og á at stinga høvdið heilt fram í heiðursmerkjarøðina, men fyri tað mesta snúu 90’ini seg umat byggja eitt nýtt lið upp.

Toftamenn gjørdu tó eisini um seg í aðrar mátar, nú nýggju tíðirnar av álvara vóru komnar til føroyskan fótbólt. Teir høvdu í nøkur ár roynt seg við ymsum útlendskum leikarum, men tá markið í 1999 varð økt til fýra leikarar, gjørdu teir skjótt av. Ikki færri enn fýra brasilianskir leikarar vórðu fingnir til vega, og tó at tað var ymiskt, hvussu tað hildnaðist hjá hesum, so fær fáur talað ímóti eksplosiónini, sum toftamenn um hetta mundi stóðu sum fremstu eksponentar fyri.

Bronsukrónurnar, sum liði vann í 2000, 2001 og 2003 vóru sum so eisini partvíst úrslit av eini hepnari hond á útlendingaøkinum, eins og felagið - hóast truplu støðuna í 90’unum – alla tíðina hevði framt eitt miðvíst ungdómsarbeiði. Eitt nú hevur felagið hesi árini uppalt leikarar sum Fróða Benjaminse, Arnbjørn Danielsen og Jann Inga Petersen, og saman við bæði lokalum og fremmandum kreftum hava hesir borgað fyri eini slíkari góðsku, at liðið framvegis varð roknað sum eitt óvanliga trupult mótstøðulið.

Tá tosað verður um fyrstudeildarfótbólt, so er tann tíðin nú fyribils farin. Tað er altíð lætt at vera eftirklókur, men sæð í bakspeglinum, so eru helst lutir, sum í vetur kundu verið gjørdir øðrvísi á toftum. Neyðugu garderingarnar fyri Hans Fróða Hansen og Fróða Benjaminsen komu ongantíð til felagið, og hartil var liðið sera meint rakt í nógvar mátar. Allar ringast var kanska, at Albert Sævarsson mátti stinga í sekkin beint undan kappingarbyrjan, og tað var ikki fyrr enn í seinnu kappingarhálvu, at skikkaður avloysari varð funnin í málið. Tað taldi heldur ikki rætta vegin, at Mikkjal Thomassen, sum skuldi avloysa Fróða í maskinrúminum, at kalla alt árið stríddst við skaða, eins og Herbert í Lon Jacobsen tíðliga á árinum breyt beinið. Hetta saman við teimum so væl kendu marginalunum – sum hesaferð hava vent ímóti B68 – hevur so líðandi máa støðið undan liðnum, og hóast liðið nærum megnaði at gera ein »Skála« seinastu umførini, so var – sum bretin segði – too little too late. Toftamenn mugu til komandi kappingarár venja seg við at skula spæla leygardag, og í so máta man seinasti dysturin á árinum vera ein forsmakkur til tað, sum nú er í væntu.

Men eitt er tó víst. Treiskni býr framvegis í monnum, og tað skal vera heilt løgið, um B68 ikki telist millum liðini, sum fara at stríðast heilt frammi í oddinum, tá tosast skal um, hvør skal vinna sær rættin til at flyta upp í bestu mansdeildini um eitt ár.

# Útisetarnir vunnu aftur

Føroyska útisetaliðið ÍF Føroyar vann sín annan dyst á rað, tá ið teir um vikuskiftið spældi ímóti ØKF í seriu 1.

Síðani summarferiuna hevur tað gingið striltið at vinna dystir, men nú ber aftur til hjá føroyska liðnum. Hesaferð vann ÍF Føroyar 6-1.

Jørgen Meitelberg gjørdi trý mál, og Pætur Dahl, Finn Mørk og John Heri Dam skutu hvør sítt mál.

**-ek**

# Keane fekk bumbu í túnið

Liðformaðurin á írska fótbóltslandsliðnum, sum Føroyar skulu spæla ímóti um góðar tvær vikur, fekk ein ordans kvøkk í mánakvøldið.

Roy Keane, sum eisini er liðformaður hjá Manchester United, var heima saman við konuni, sum er við barn, og sínum fýra børnum, tá ið ein heimagjørd bumba varð tveitt eftir húsunum hjá honum.

Bresturin var ógvusligur, men eingin fekk skaða av bumbuni, sum var gjørdu burtur úr einum kassa við fýrverki.

Saman við bumbunu vóru eisini ein boð til Keane: Tín írski býttlingur.

Løgreglan kannar nú málið, men veit einki at siga um, hví bumban var tveitt eftir húsunum hjá Roy Keane.

**-ek**

# Nýtt stadion í Liverpool

Enska felagið Liverpool hevur fingið grønt ljós myndugleikunum til at fara undir at byggja sær ein nýggjan leikvøll at spæla. Anfield Road, sum núverandi leikvøllurin hjá Liverpool, er ikki tíðarhóskandi longur, og tí er ætlanin at byggja nýtt stadion. Hetta stadion skal taka 60.000 áskoðarar, og tað fer at kosta hálva aðru milliard krónur. Tað skal standa liðugt í 2007.

**-ek**

# Minni avlop í Manchester

Heimsins ríkasta fótbóltsfelag, enska Manchester United, vinnur ikki so nógvar pengar nú, sum tað hevur gjørt seinnu árini. Avlopið í Manchester United er seinnu árini farið úr 600 milliónum krónum og niður í 400 millónir krónur, og útlit eru til, at avlopið fer at minka meira næstu árini. Orsøkini er fyrst og fremst, at felagið fær minni pengar fyri sjónvarpsrættindini til sínar dystir.

**-ek**

# Verjuspælari datt á súkklu

Verjuspælarin Enrique Romero var ikki við í Champions League dystinum hjá spanska felagnum Deportivo týskvøldið. Orsøkin var, at hann datt á súkklu um vikuskiftið.

Romero súkklaði í nánd av húsunum hjá einum vinmanni, tá ið ein hundur kom fyri súkkluna hjá honum. Endin var, at Romero datt av súkkluni skaddi sær niðasta partin av rygginum. Skaðin er ikki álvarasamur, men Romero fekk ikki spælt týskvøldið.

**-ek**

# Zidan bót fyri at jubla

Danska felagið FC Midtjylland fer at fáa eina rokning frá AGF eftir superligadystin sunnudagin.

Tað kemst av, at tá ið Mohamed Zidan legði FC Midjylland á odda 1-0, feiðraði hann málið við at sparka hol á eina bandalýsing á vøllinum. Tað vilja teir í Århus ikki finna seg í, og teir fara at senda FC Midtjyllandi eina rokning.

Stjórin í AGF, Frank Heskjær, sigur við heimasíðuna onside, at rokningin verður einar 1600 krónur.

Ítróttarstjórin í FC Midtjylland vil ikki gera viðmerkingar til rokningina frá AGF.



Fiskirannsóknarstovan

## Søkt verður eftir verkfrøðingi

Fyri starvsfólk í farloyvi søkir Fiskirannsóknarstovan eftir fólki í eitt 2 ára tíðarskeið til data viðgerð og viðlíkahald av tólum. Starvið umfatar viðgerð av m.a. streym-, hita- og saltmátingum. Harumframt umfatar arbeiðið eisini viðlíkahald av tólum eins og at gera tól klár til mátingar og annað hesum viðvíkjandi.

Umsøkjarar skulu hava verkfrøði prógv við høvuðsgrein innan matematikk, fysikk, geofysikk, elektronikk ella samsvarandi øki.

Løn og setanartreytir vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir við prógvum og c.v. skulu sendast til:

**Fiskirannsóknarstovan**
Boks 3051
FO-110 Tórshavn

og vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. oktober 2004.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Karin Margrethu H. Larsen á Fiskirannsóknarstovuni, tlf. 35 39 00.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

## Skipasmiðjan søkir skrivstovunæming

Hevur tú hug at koma í skrivstovulæru á Tórshavnar Skipasmiðju?

Tú hevur miðnámsútbúgving, og harumframt kundu vit hugsa okkum, at tú:

- Ert opin og hevur lætt við at samskifta
- Dugur mál (føroyskt, tey norðurlendsku og enskt)
- Hevur góðan telduførleika
- Ert framfýsin og ágrýtin

Í lærutíðini fert tú at starvast á ymsum deildum hjá fyritøkuni í Havn.
Talan verður um nakrar mánaðir á goymslunum, í bókhaldinum, í lønardeildini og í innkeypsdeildini. Góður møguleiki er fyri føstum starvi eftir lokna lærutíð. Tað er ikki verri, um tú hevur áhuga fyri skipum og teknikki.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
Att.: Helgi Nielsen
Postsmoga 65
110 Tórshavn

í seinasta lagi tann 11. oktober 2004. Hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til Helga Nielsen á tlf. 30 11 00.

*Á p/f Tórshavnar Skipasmiðju starvast um 230 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur umfata mekaniskar, stál, timbur, máling, beding, tekniska ráðgeving og beinleiðis sølu av goymslu. Skipasmiðjan hevur deildir í Havn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.*

STANLEY GÁVUBÚÐIN
LANGT VIKUSKIFTI VIÐ RIMMAR ÚTSØLU
OPEN BY NIGHT:
1. OKTOBER OPIÐ TIL KL. 22.00
LANGUR LEYGARDAGUR:
2. OKTOBER OPIÐ TIL KL. 17.00
10,- 20,- 30,- MARKNAÐUR
GÓÐ MÁLINGA OG GÓLVTILBOÐ:
10 LTR MÁLING: 199,-
GÓLV ÚR 59[95] PR. M²
IKKI ÚTSØLUVØRUR - 10%
(UNDANTIKIÐ ELVØRUR)
NÓGV NÝGGJ VØRA HEIMKOMIN
KOM OG GER KVETTIÐ
STANLEY
460 NORÐSKÁLA · TEL 42 22 70

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

TOYOTA COROLLA
T-sport 192 HK



ÁRG. JULI 2002 · KM 31.000 · 6 GEAR
TIL SØLU FYRI 190.000 KR
Biligari bilur kann ganga inn í býti
TEL 514716

## Vallisti

Vallistin til kommunuvalið 9. november 2004 yvir veljarar í Vestmanna Kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunu-skrivstovuni í vanligari skrivstovutíð frá 4. til 18. oktober 2004.

Kæra um, at onkur av órøttum er komin á listan, ella onkur rættkomin ikki er tikin við, skal í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin verða send valnevndini, sum kannar og tekur endaliga avgerð í málinum.

**Vestmanna Kommuna**

BÁTUR TIL SØLU



Um hóskandi boð fæst,
er M/S Randi til sølu uttan fiskiloyvi.
Tel 218397 / 448397